gult cyan magenta svart

Ítróttur

e-mail: jakup@sosialurin.fo
Sosialurin - Box 76 - 110 Tórshavn - Tlf. 31 18 20 - Fax 31 47 20

Lesi› eisini ítróttin á alnetinum
www.sosialinum.fo

Sivic seg›i møguleikan frá sær

KÍ venjarin fekk í síni tí› tilbo› um sáttmála vi› Rey›u Stjørnu, men hann var ov ótolin


Hóast hann hev›i tilbo›i› frá Rey›u Stjórnu seg›i Sivic, nei takk...

Sí›ani ta› gjørdist greitt, at fyrsta mótstø›uli›i› í Europa Cup í ár hjá jugoslaviska stórfelagnum Rey›u Sjørnu úr Beograd, fór at ver›a KÍ, hevur áhugin í Jugoslavia veri› stórur fyri føroyskum fótbólti. Og onkuntí› man ta› hava veri› torførari hjá útlendsku fjølmi›lunum at fáa uppl‡singar, enn ta› hevur veri› hesa fer›. KÍ venjarin er úr Jugoslavia ,og hann er hesar sí›stu vikurnar ofta uppringdur úr heimlandinum.

– Jugoslavisku fjølmi›larnir kenna ikki so heilt líti› til føroyskan fótbólt. Landsli›i› hjá gamla Jugoslavia spældi ímóti Føroyum í 1991, og londini vóru aftur í sama HM undankappingarbólki í fyrstu kappingini sum Jugoslavia luttók í eftir, at vi›urskiftini vóru broytt á Balkan.

Ta› er Tomislav Sivic, sum grei›ir frá. Tá vit spyrja hann, hvat landsmenninir, sum fáa løn fyri at kunna jugoslavar um fótbólt, vilja frætta úr Føroyum, so smílist Tomislav Sivic:

– Teir spyrja, hvat í allari ví›u ver› ein jugoslaviskur spælari og venjari ger í einum fjarskotnum oyggjalandi so langt úti í Atlantshavinum. Eg skal ikki dylja, at teirra fatan er, at Rey›a Stjørnan fer ikki at fáa trupulleikar at koma ví›ari í næsta umfari›. Og ta› er kanska ikki so undarligt, at teir hugsa solei›is, tí í landsdystunum hava teir ikki havt nakrar trupulleikar.

Tølini siga, at Sivic hevur rætt. Í 1991 taptu Føroyar 7-0 í Beograd og 2-0 í Landskrona. Í 1996 taptu Føroyar 3-1 í Beograd (John Petersen minka›i í 2. hálvleiki um munin til 3-1) og á Svangaskar›i var heilt gali› hjá føroyingum, sum taptu 8-1 (Jan Allan Müller skora›i føroyska máli›).

Tilbo› um sáttmála

Í gjár nevndu vit, at Tomislav Sivic spældi í Rey›u Stjørnuni frá 1982 til 1985, tá hann var ungdómsspælari:

– Tá unglingaaldurin var av, bjó›a›u teir mær ein betri sáttmála. Eg tók ikki av, eg valdi at flyta aftur í barndómsfelagi›.

Hví tókst tú ikki av?

– Treytin fyri sáttmálanum var, at teir ta› fyrsta ári› skuldu leiga meg út til eitt anna› felag. Eg havi altí› gingi› mínar egnu lei›ir. Tá eg nú líti aftur á tí›ina fyri fimtan árum sí›ani, so var ta› kanska at spilla ein gó›an møguleika burtur, at eg ikki vildi ganga undir treytirnar hjá teimum.

Hevur kanna› gongdina

Tomislav Sivic er væl kunna›ur um stø›una í Rey›u Stjørnu. Hann veit hvør spælari spælir á hvørjum plássinum, og hann veit, hvussu ta› hevur gingist Rey›u Stjørnuni, sum hevur veir› í Eysturríki og fyrireika› seg til Europa Cup og n‡ggja kappingarári›:

– Milan Milanovic, sum var venjari hjá VB, hevur givi› mær hentar uppl‡singar. Men hann hevur eisini sagt mær, at teir í Rey›u Stjørnuni hava spurt seg fyri um KÍ, so teir eru eisini væl fyrireika›ir.

jh

34 spælarar hava roynt seg

KÍ fer í kvøld at spæla í Europa Cup fyri 9. fer›

Tá KÍ í kvøld rennur inn á vøllin á Svangaskar›i, er ta› níggjunda fer›in, at teir fara at royna seg í Europa Cup. KÍ var fyrsta føroyska li›i›, sum spældi á heimavølli í Europa Cup. Ta› var 19. august í 1992. Mótstø›uli›i› var Skonk Riga, sum vann 3-1. Olgar Danielsen skora›i máli› hjá KÍ. Í teimum átta dystunum higartil hevur KÍ skora› seks mál. Olgar Danielsen hevur skora› fimm, og Kurt Mørkøre hevur skora› eitt.

F‡ra eru framvegis vi›

Í teimum átta altjó›a dystunum hava 34 spælarar umbo›a› KÍ. Av teimum, sum vóru vi› í 1992, eru f‡ra vi› í 1. deildarhópinum í ár. Teir eru Harley Bertholdsen, Jan Andreasen, Jan Joensen og Frí›in Ziskason. Frí›in hevur ikki spælt nógv tey seinnu árini, men hann hevur vant nógv í ár, og hann var í vikuskiftinum vi› á Svangaskar›i.

John Ryan var vi› í 1992, og hann hevur spælt vi› KÍ í ár. Men hann heldur seg ikki hava tí› at vera vi› í Europa Cup hesa fer›.

Jan Andreasen, Harley Bertholdsen og Jan Joensen eru einastu KÍararnir, sum hava veri› vi› í øllum átta dystunum. Men eingin teirra hevur spælt 90 minuttir allar átta fer›irnar. Jan Andreasen var› útskiftur í seinna dystinum í 1992. Annars hevur hann spælt alla tí›ina hvørja fer›. Jan Joensen var› eisini útskiftur í seinna dystinum í 1992. Í hinum sjey dystunum hevur hann spælt alla tí›ina. Í f‡ra dystum hevur Harley Bertholdsen veri› innskiftur ella útskiftur.

Vita hvat ta› sn‡r seg um

Klaksvíkingar hava vant dúgliga seinastu vikurnar. Teir vóru á Svangaskar›i fríggjadagin, leygardagin og aftur sunnudagin, og í gjárkvøldi› skuldu teir fara út aftur. Teir skuldu halda til í ítrottarhúsinum inntil í kvøld.

– Vit vita, at mótstø›an ver›ur stór, men vit fara at gera okkara besta. Vit skulu í hvussu so er vera betur fyri, enn vit vóru á heimavøllinum í fjør, tá vit taptu 5-0 og spældu stak vánaliga, sigur Harley Bertholdsen.

Eingin ivi er um, at mótstø›uli›i› í kvøld er væl betri, enn ta› var í fjør.

KÍ er einasta føroyska li›i›, sum hevur vunni› í Europa Cup. 24. august í 1995 vunnu teir 3-2 á Svangaskar›i ímóti ísraelska Maccabi Haifa.

Samla›i málmunurin í teimum átta dystunum higartil er 6-30.

jh

gult cyan magenta svart

Tryggur sigur til Sveis

Sveisiska U-18 kvinnulandsli›i› var ein ov stórur biti at gloypa hjá teimum føroyksu gentunum, og tapi› kundi veri› størri enn 5-0

Sveisisku genturnar vóru sum oftast fyrr á bóltin. Føroyska gentan á myndini er Elin Højsted

STEFAN Í SKORINI

Føroyska U-18 kvinnulandsli›i› leikti mánadagin landsdyst ímóti Sveis í EM-minikappingini, sum fór í gongd í Gundadali í gjár og endar fríggjadagin. Sveisiska li›i› vann ein grei›an 5-0 sigur á føroysku gentunum, sum ikki megna›u at fylgja vi› teimum kviku sveisisku gentunum.

Hildu máli› reint leingi

Ein hálvur tími var farin av dystinum, á›renn Sveis fekk ta› fyrsta máli›. Á›renn ta› hev›i føroyska verjan sta›i› stinn, og mótstø›uli›i› hev›i bara havt eini tveir málmøguleikar, sum ikki góvu naka›.

Tá i› umlei› eitt korter var› eftir at leika av fyrra hálvleiki, hendi ta›, sum vit hava sæ› so ofta fyrr, tá i› føroysk li› eru vi› í altjó›a kappingum. Leikararnir megna ikki at ver›a konsentrera›ir allar 90 minuttirnar, og tí fáa mótstø›uli›ini nøkur mál, sum eiga at ver›a byrgd uppfyri.

Hetta hendi eisini í tveimum teimum fyrstu málunum hjá Sveis. Eitt lágt innlegg úr vinstru sí›u endar vi›, at ein sveisiskur leikari stendur púra fríur inni í føroyska málteiginum vi› opnum máli frammanfyri sær, og hon sveik ikki, men leg›i útili›i› framum 1-0. Føroyska li›i› var nær vi› at halda máli› reint í fyrra hálvleiki, men ta› eydna›ist tíverri ikki. Næsta máli› hjá Sveis var ein verjuvilla í føroysku verjuni. Aftasti verjuleikarin hjá Føroyum, Frí›a Petersen, skuldi sparka bóltin burtur, men rakar ísta›in ein av sveisisku áleyparunum, sum gjørdist púra fríur og plasera›i bóltin framvi› Onnu Kristinu Petersen í málinum.

Besta royndin hjá føroyska li›num á sveisiska máli› í øllum dystinum var í fyrra hálvleiki, tá i› Una Olsen kom í skotstø›u í brotsteiginum. Hon royndi seg vi› skoti, men bólturin fór framvi› málinum.

Maria Johnsson í hornatøkum vi› tveir sveisiskar leikarar

Sveis tók fullkomiliga yvir

Í seinna hálvleiki setti sveisiska li›i› seg á dystin, og bólturin kom sjáldan ni›an á sveisisku hálvuna. Sveisisku genturnar svumu í málmøguleikum, men fingu bert tr‡ mál í seinna hálvleiki.

Heilt fitt av vindi var omaneftir vøllinum í Gundadali, og føroysku genturnar høvdu ilt vi› at flyta spæli› ni›an á ta sveisisku hálvuna. Hetta hev›i vi› sær, at allur seinni hálvleikur var eitt langt álop á ta› føroyska máli›.

Tá i› eini fimm minuttir vór›u leiktir, var aftur bo› eftir føroysku verjuni. Ein av sveisisku framherjunum gjørdist fríur og setti bóltin í neti› úr spískum.

Fjór›a máli› í dystinum var kanska ta› besta, men føroyska verjan má eisini taka ein part av ábyrgdini. Ein sveisiskur verjuleikari fekk fatur á bóltinum á mi›jum vølli og gjørdi ikki mætari enn at reka einsamøll oman í tann føroyska brotsteigin, har hon vi› einum fløtum skoti setti bóltin í máli› aftanfyri føroyska málverjan.

Í teimum seinastu minuttunum av dystinum dømdi dómarin brotsspark til Sveis, eftir at ein av føroysku leikarunum hev›i n‡tt hondina til hjálpar inni í brotsteiginum, og hetta var› sekta› vi› brotssparki, sum li›skiparin hjá Sveis tók, og hon sveik ikki áliti›, men setti bóltin í neti› til endaligu stø›una 5-0.

Skal nakar av føroysku leikarunum rósast, so er ta› Annelisa Justesen úr KÍ, sum stríddist væl í føroysku verjuni.

Tær sveisisku genturnar vóru nógv naskari og frekari enn føroyingarnir í teirra spæli. Føroysku genturnar gjørdu nærum einki fríspark í øllum dystinum, og ta› er avgjørt ney›ugt, um eitt betri úrslit skal fáast næstu fer›.

Í hinum dystinum í gjár vann Ukreina 2-1 á Skotlandi. Næstu dystirnir ver›a mikudagin á ovara vølli í Gundadali. Føroyar skal spæla ímóti Skotlandi kl. 17, og kl. 15 møtast Ukreina og Sveis.

Sveis - Føroyar 5-0 (2-0)
30.: 1-0 Kathrin Meier
40.: 2-0 Sylvia Huegli
49.: 3-0 Kathrin Meier
62.: 4-0 Chiara Delmenico
90.: 5-0 Sonja Loeffel

Føroyska li›i›: Anna Kristian Joensen - Maria Johnsson, Poula Gregersen, Elsebeth Hansen, Annelisa Justesen, Frí›a Petersen, Elin Højsted (60. Maibritt Olsen), Súsanna Hansen (75. Asta Magnussen), Una Olsen, Heidi Jacobsen, Laila Jespersen (55. Rósmari Haralsen).

Ukreina - Skotland 2-1 (0-0)
60.: 0-1 Karen Penglase
65.: 1-1 Vira Dyatel
75.: 2-1 Yuliya Doktorova